# Hava tapt seg **eitt tons**

20 av teimum helst 26 føroyingunum, sum hava verið í Noregi og fingið magasekkin snørdan saman, hittust til eitt jólaborðhald á Eiði fyrr í mánaðinum. Tilsamans hava tey tapt seg 939 kilo



*Liljan Jakobsen hevur tapt seg smá 30 kilo og vigar nú um 150 pund*
*Mynd: Álvur Harandsen*

Nógvir eru hættirnir at kænka seg upp á, og mong eru tey, sum bjóða klænkiskeið fram. Uppaftur nógv fleiri eru tey, sum taka av ymsu tilboðunum og royna at lætna nøkur kilo við at fylgja góðum ráðum.

Hvussu hesi ráðini og skeiðini hildnast, tað er ein heilt annar spurningur. Men tað finst altso ein púra vissur máti at tapa seg upp á. Tað er nevniliga ein íslendingur, sum hevur specialiserað seg í at snøra magasekkin á fólki sama. Hetta førir við sær, at 95% av magasekkinum verður ónýttur og óvirkin, eitt slag av eini by-pass skurðviðgerð.

Ein av teimum føroyingum, sum hevur fingið hesa skurðviðgerð, er 53 ára gamla Liljan Jakobsen, sum býr í Miðvági.

Tað er ikki meiri enn eini tvey ár síðani, at fyrsti føroyingurin fekk hesa skurðviðgerð. – Hetta var ein maður av Sandoynni, haðani eg sjálv eri ættað, og soleiðis frætti eg um hendan møguleikan at klænka seg, sigur Liljan Jakobsen.

Tilgongdin er soleiðis, at lækni ávísir hendan viðgerðarháttin, og so fara fólk yvir til Noregs í bólkum at verða skurðviðgjørd. Sjálv fór Liljan sjálv fjórða yvir á serklinikkina hjá Hjørti Gislason at fáa framt viðgerðina.

– Vit vóru fýra kvinnur sum fóru yvir til Oslo ein hósdag, og so vórðu vit kannaðar fríggjadag. Sjálv skurðviðgerðin fór fram mánadag, og síðani lógu vit til eftirlit fram til fríggjadag, tá vit aftur sluppu á hotellið, har vit so vórðu fram til mánadag, tá vit aftur flugu heim til Føroya, sigur Liljan Jakobsen.

**Nýtt menniskja**

Tað krevur sjálvandi nakað at fáa eina slíka skurðviðgerð framda, men tað er einki ímóti fyrimununum.

– Eg skal ansa eitt sindur eftir tí, eg eti. Tað skal ikki vera ov søtt ella ov fitandi, annars verður mann illa fyri, sigur Liljan Jakobsen.

– Lívið broytist, og hóast dýra skurðviðgerðin verður goldin av landinum – ella statinum, tað eri eg